# Fundarfrágreiðing Lestrarráðið 15.11.17

**Møtt:** Durita, May-Britt, Daniella, Amanda, Karin Elisa, Jórun Maria,

**Ikki møtt:**

**Dagsskrá:**

1) Vælkomin til nýggjar limir, sum byrja fundin við at presentera seg

2) Góðkenning av fundarskrá

3) Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn (sí viðfesti)

4) Lesandi í lestrarráðnum greiðir frá NSSK fundinum í Føroyum 29. – 30 septembur 2017

5) Kjak um menning av eftirmetingarskjølum av ástøðiliga- og kliniska partinum í sjúkra-røktarfrøðiútbúgvingini

6) Viðgera tvær umsóknir um góðskriving (sí viðfesti). Útbúgvingarleiðari í fólkaheilsu luttekur.

7) Ymiskt

- Dialog um remedier/amboð í venjingarstovu í Sjóvinnuhúsinum
- Annað
-

| Evni | Viðmerkingar | Niðurstøða |
|---|---|---|
| **AD1:**<br>Vælkomin til nýggju limirnar í lestrarráðnum | Forkvinnan í lestrarráðnum bjóðar teimum nýggju vælkomnum. | |
| **AD2:**<br>Góðkenning av fundarskrá | | Skráin er góðkend. |
| **AD3:**<br>Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn | | Fundarfrásøgnin var góðkend. |
| **AD4:**<br>Lesandi greiðir frá NSSK fundinum í Føroyum 29. septembur 2017 | NSSK er eitt felag fyri lesandi, eitt undir felag fyri SSN<br><br>Hvørt land legði trý evnir fram<br><br>Umboð frá Danmark tosaðu um niðurskurð av arbeiðsorku | |

| | | |
|---|---|---|
| | Í Svøriki og Finnlandi kann man lesa sjúkrarrøktarfrøði á netinum<br><br>**Norra**<br>Í Norra hava Sjúkrarøktarfrøðiskúlarnir ikki felags eindarlýsingar, og tí onga standard útbúgving fyri landið.<br><br>**Ísland**<br>Umboð frá Íslandi løgdu fram um lesandi. Lønin sum sjúkrarøktarfrøðingur var ikki nøktandi. Lønin er hægri í heimatænastuni enn á sjúkrahúsi<br><br>Lesandi hava 100 % møtiskyldu, tá tey eru í starvsvenjing<br><br>Í Reykjavík verða 100 lesandi tikin inn, og eftir einum ári verður ein stop-prøvi, har helmingurin sleppur at halda áfram. Ynskiligt er at fáa javnari býtið millum kynini, so at fleiri mannfólk søkja inn á skúlan. Í løtuni eru tað 2 % mannfólk.<br><br>**Finland**<br>Í Finlandi verður heilsuverkið privatiserað so at tey koma at gjalda fyri læknahjálp<br><br>Lesandi kunnu taka útbúgvingina yvir netið sum fjarlestur, og man kann taka útbúgvingina uppá 2 ár<br><br>Studningurin er minkaður og vanligt er at taka lestrarlán<br><br>**Svøríki**<br>Ynskiligt er at fáa hægri løn sum sjúkrarøktarfrøðingur<br><br>Mannligir sjúkrarøktarfrøðingar fáa ofta hægri løn enn tær kvinnuligu sjúkrarøktarfrøðingarnir<br><br>**Føroyar**<br>• Møtiskylddan er hækka frá 80% til 90% í praktikkini og tímataliið er hækkað frá 30 til 32 tímar pr. viku. | |

| | | |
|---|---|---|
| | Hetta er ein royndarkoyring og verður eftirmett aftur í komandi vár<br><br>• Vilja stovna eitt felag fyri lesandi<br><br>• Flyta skúlan í Sjóvinnuhúsið<br><br>**Næsti dagur**<br><br>Umboð frá føroyskum lesandi greiddu frá útbúgvingini. M.a. at tey vóru lesandi til tey vóru útlærdir sjúkrarøktarfrøðingar, hvussu introduktiónin er, tá man er nýggjur í arb, at summa staðni hevur man ein mentor tann fyrsta mánaðin.<br>Tey vístu luttakarunum runt á skúlanum og greiddu frá eindarlýsingunum. | |
| **AD5:**<br>Kjak um menning av eftirmetingarskjølum av ástøðiliga- og kliniska partinum í sjúkra-røktarfrøðiútbúgvingini | | Verður tikið upp á næsta fundi |
| **AD6:**<br>Viðgera tríggjar umsóknir um góðskriving (sí viðfesti). | | Allar tríggjar umsóknir um góðskrivingar verða góðkendar |
| **AD7:**<br>Ymiskt<br>• Dialog um remedier/amboð í venjingarstovu í Sjóvinnuhúsinum (Durita)<br>• Annað | Amboð til venjingarstovuna, tá flutt verður í Sjóvinnuhúsið<br>• Loftslift<br>• Koyristól<br>• Rullu/drop stativ á hjólum<br>• Skermar at hála út frá vegginum sum eru millum sengurnar<br>• Hoytalarir | |

Næsti fundur 10. 01.18